TV3

Leygardagur 4. mars
7.00 **Fyri børn**
9.00 **Power Rangers**
9.30 **NBA - kurvabóltur**
10.30 **Kom I form med TV3**
11.00 **Saved By The Bell**
11.30 **TV Shop**
13.35 **Reasonable Doubts**
14.30 **Gensyn med Tak For Kaffe**
15.30 **Gensyn med Stjernestøv med Suzanne**
16.30 **The Fugitive**
17.25 **Married With Children**
17.55 **TV3 beinleiðis**
18.00 **Flintstones**
18.30 **McGregor Saga**
19.25 **Rik og kend**
19.55 **Rejsefeber**
20.55 **Tequila Sunrise**
Michelle Pfeiffer spælir saman við bæði Mel Gibson og Kurt Russel í hesum romantiska filminum, sum Robert Towne hevur leikstjórnað.
Vinmenninir báðir Dale Mc Kussic og Nick Frescia eru nú hvør sínu megin lógina. Dale er ríkur kokain-bakmaður, og Nick er løgreglumaður í Los Angeles. Umstøðurnar noyða nú Dale at gera ein seinasta narkohandil við nakrar mexikanskar narkobrotsmenn. Nick ávarar hann um avleiðingarnar og eftirsum vinmaðurin ikki vil lurta eftir honum, ger Nick av at taka hann, kosta hvat tað vil...
Filmurin er frá 1988.
23.00 **Manhunter**
23.55 **Saturday Night Live**
0.55 **Liðugt**

Sunnudagur 5. mars
7.00 **Fyri børn**
9.00 **Power Rangers**
9.30 **Wrestling**
10.30 **NBA kurvabóltur**
11.00 **Kom I form med TV3**
11.30 **Gensyn med Freebee**
12.30 **Váríð i TV3**
12.40 **Gæst hos Thyboe**
13.10 **The Abdiction**
15.00 **Poirot**
16.00 **The Fugitive**
17.00 **Murder She Wrote**
17.55 **TV3 beinleiðis**
18.00 **Hundaliv**
18.30 **Nýggj sendirøð: Vildt forelsket**



Birthe Kjær er vertinna í hesi nýggju sendingini, har 3 pør kappast um at sleppa at giftast í sjónvarpinum, so øll hava høvi at siggja tey. Í hvørjari sending er ein kendur sangari ella sjónleikari, og í fyrstu sending syngur Birthe Kjær sjálv »Alle verdens glæder«.
Tey fyrstu trý pørini eru: Anita Hansen og Tonny Kristensen frá Keypmannahavn. Rikke Nielsen og Torben Jul Knudsen frá Gentofte. Lykke Pedersen og Allan Andersen frá Nykøbing Sjælland.
Kappast verður í telduspæli, at gita m.a. býir í Europa, fjøll o.a.
At enda lata vinnararnir seg í brúdleypsklæði og verða gift.
20.00 **Prince of Tides**
Am. filmur frá 1991.
Nick Nolte fekk ein Oscar fyri sín leiklut í hesum filminum, har hann spælir saman við Barbru Streisand, sum eisini hevur leikstjórnað.
Tom Wingo er arbeiðsleysur lærari og fótbóltsvenjari hjá South Carolina. Hann er giftur við Aallie, men hann er beiskur inn á øll, tað kemst av mammu hansara, Lila. Systir Tom, rithøvundin Savannah, býr í New York, har hon fleiri ferðir hevur roynt at tikið lívið av sær. Tom fer nú til New York at tosa við sálarfrøðingin hjá henni, Susan Lowenstein, sum fegin vil hava fleiri upplýsingar um Savannah. Tom dugir illa at føra seg fram í stórbýnum, men hann greiðir sálarfrøðinginum frá nógvum um seg og systir sína
22.25 **A. C. Clarkes Mysterious World**
22.55 **Against the Law**
23.50 **Matrix**
0.50 **Liðugt**

Mánadagur 6. mars
5.30 **Fyri børn**
7.00 **Herman's Head**
7.30 **Walter & Emily**
8.00 **Grannar**
8.30 **Hygg, ring og keyp**
10.30 **TV-Shop**
12.25 **The Count of Monte Cristo**
Am. ævintýrfilmur frá 1934.
Hin ungi sjómaðurin Edmond Dantes hevur júst fingið betri arbeiði og skal giftast við Mercedes, sum er sera vøkur. Men so verður Dantes ákærdur og dømdur fyri eina brotsgerð, sum hann ikki hevur framt og endar í eini fangaborg; Chateau d'If, sum er umgyrd av sjógvi. Í nógv ár livir Dantes eitt vána lív í fangaholinum, til hann kemur í samband við ein prest, sum eisini er fangi, Abbed Foria. Hesin sigur honum frá einum pirat-skatti, sum er grivin á oynni Monte Cristo. Frá teirri løtu roynir Dantes alt fyri at sleppa burtur úr fangaborgini og tað eydnast honum at enda. Hann fer til Monte Cristo, har hann eftir at hava funnið skattin, fær sær annað navn – greivin av Monte Cristo, og nú kann hann hevna seg...
Leikarar: Robert Donat, Elissa Landi, Louis Calhern, Sidney Blackmer, Raymond Walburn, O. P. Heggie, William Farnum, Georgia Caine. Leikstjórn: Rowland V. Lee.
14.10 **A touch of Love**
14.40 **Grannar**
15.10 **21 Jump Street**
16.05 **T. J. Hooker**
17.00 **Family Passions**
17.55 **TV3 beinleiðis**
18.00 **Peter Pan**
18.30 **Kamera Kiks**
19.00 **Melrose Place**
19.55 **Heart of Justice**
21.35 **TV3 beinleiðis**
21.40 **In The Heat of the Night**
22.35 **Cat People**
Amerikanskur ræðufilmur frá 1982. Irena Gallier flytur saman við beiggja sínum, »kettumanninum«. Hon verður forelskað í einum zoologi, men av gátuførum um-støðum riggar einki sum tað eigur. Samstundis verður býurin herjaður av einum svørtum pantara.
Leikarar: Nastassia Kinski, Malcolm Mc Dowell, John Heard, Annette O'Toole, Ed Begley, Je., Scott Paulin, Frankie Faison, Ron Diamond og Lynn Lowry. Leikstjórn: Paul Schrader.
0.30 **Liðugt**

Týsdagur 7. mars
5.30 **Fyri børn**
7.00 **Big Brother Jake**
7.30 **Eitt gott lív**
John harmast um sonin, Paul, sum hjálpir ov lítil til heima. John biður hann tí hjálpa til á goymsluni eftir skúlatíð, so hann lærir eitt sindur av ábyrgd og vinnur sær lummapening. Fyrsta dagin, Paul er til arbeiðis, noyðist John tíðliga heim, so hann gevur Paul boð um at steingja eftir sær og sigur honum koduna til elektroniska lásið.
8.00 **Grannar**
8.30 **Hygg, ring og keyp**
10.30 **TV Shop**

Sjónvarp Føroya

Leygardagur 4. mars
14.00 **Veitst tú, at...**
Timothy Dalton roynir í hesi sending at finna út av, hví so nógv fólk ræðast úlvar, tá ið so fá hava sæð hann.
Harumframt skulu vit fylgja filum, ið eru komnir aftur til Afrika einum amerikanskum zoologi fyri at takka.
15.00 **Enskur fótbóltur Aston Villa–Blackburn**
16.45 **Tey glaðu 60-ini hjá mær** (ft)
Systir Kevin, sum er hippie, er rýmd frá sjeikinum, tí hann hevur biðið hana gifta seg við sær. Hon er í øðini og kemur nú heim aftur.
17.10 **Garth Brooks**
Tann væl umtókti Garth Brooks hevði konsert í Danmark tann 3. oktober, og Hans Otto Bisgaard lýsir ein cowboy, sum hevur vunnið meginpartin av heiminum fyri seg.
17.40 **Sofaliðið**
Ein ør søga um ein dag í einum háhúsum – einum heilt vanligum háhúsum. Ein kona upp14. hædd skal hava eina sofu upp, men trupulleikin er at sofan ikki sleppur inn í lyftuna, so hon má berast upp, og tað skulu tey fýra Ole, Iben, Jørgen og Louise royna at gera.
18.10 **Disney teknifilmar**
Hesaferð skulu vit siggja filmar-nar: Dunnu Dánjal í oyðimørkini. Mikkjal Mús sum leikhússtjóri. Pluto í køkinum. Kenguruin hjá Dunnu Dánjali.
18.40 **Børnini við havið** (ft) 25:26
Jack finnur út av, at Halliwell stendur fyri sabotasjuni av »Hunter«, og Jim verður í øðini, tá ið stjórin hjá honum ger av, ikki at ákæra. Georgie, Peter og vinir teirra gera av sjálv at taka sær av málinum móti Halliwelll, men vita tey, hvussu vandamikið tað kann vera?
19.05 **Beverly Hills**
Amerikansk ungdómsrøð.
Jason hevur funnið ein nýggjan vinmann í skúlanum. Mattnew dugir alt: ítrótt, skúlating, alt.
Men Jason varnast skjótt, at tað er pápin, ið pressar Matthew fram, og hann fær ein illgruna um, at Matthew ætlar sær at drepa pápa sín.
19.50 **Gotved fimleikur**
20.00 **Grannar okkara**
20.40 **Skjaldbøkan – eitt lív í slow motion**
Ensk náttúrusending um tey ymisku sløgini av skjaldbøkum. Nógv sløg eru minkað nógv og onnur eru í vanda fyri at doyggja út. Lívfrøðingar royna at bjarga teimum, sum eru í størst vanda fyri at verða avoydd.
21.05 **Olsen-banden**
Tann sætti Olsen Banden-filmurin frá 1974.
Olsen og teir eru at enda komnir til dreymaoynna Mallorca, har teir ætla at dusa sær og njóta lívið. Men planurin hjá Egon miseydnaðist, og teir eru farnir avstað uttan milliónirnar. Men Egon hevur ein nýggjan



plan. Eitt kvett undir grísaveitsluni. Tiverri gongst ikki sum ætlað, og Egon endar aftur heima í Vridsløse. Men her situr hann ikki hendur í favn. Hann fær snevilin av einum nýggjum, stórum kvetti.
22.40 **Frælsisskuggin** - 3:4
Donsk sjónvarpsrøð í fýra pørtum. 3. partur.
Tað gongst striltið hjá Lassa at fáa alibi fyri náttina, tá bankastjórin varð myrdur, nú Thomas



eisini er myrdur. Samstundis jagstrar løgreglan hann. Men kona Thomas trýr uppá, at hann er ósekur, og letur dóttur sína krógva Lassa.
23.30 **Søs & Kirsten**
Show við Kirsten Lehfeldt og Søs Egelind á Søerup Herregård.
0.45 **Liðugt**

Sunnudagur 5. mars
14.00 **Biofar – lívið við føroysku strendurnar** 2:3 (e)
14.40 **Galloway húskið**
Am. filmur frá 1964.
Saman við konuni og børnunum stríðist Cam Calloway fyri at gera eitt vatn nærhendis heimi teirra til eitt fuglareservat. Ein stór fyritøka ætlar sær at keypa økið og brúka tað til at veiða á.
16.45 **Gudstænasta**
17.55 **Dreymagentan**
Takarazuka er ein kendur japanskur sjónleikaraskúli, ið hevur framsýningar, sum eru avbera væl umtóktar. Disiplinin er beinhørð, og lýdni og reingerð er partur av undirvísingini. Ein dreymur hjá nógvum ungum gentum – og foreldrum teirra.
18.45 **Um lívið á Hyttenæs**
19.00 **Lítli lækni á preriuni** (ft)
Michaela og Sully finna út av, at bankastjórin, sum er komin heimaftur til Colorado Springs, hevur tikið Ku Klux Klan við sær. Tey royna at steðga tí harðliga virkseminum hjá Klaninum.
19.45 **Fint skal tað vera**
20.15 **Samrøða við Friðrik krúnprins**
Á Amalienborg fortelur krúnprinsurin Lisbeth Hvidt á TV2 um lívið sum krúnprinsur. Meira enn eina ferð hevur hann verið argur um, at hann ikki hevur somu møguleikar sum onnur ung at gera sum honum lystir. Og hann viðgongur, at hann mangan hevur følt hetta sum eitt trýst.
Krúnprinsurin sigur eisini frá sínum barnaárum, um viðurskiftini við foreldrini og vinirnar, og hvussu lívið í herinum gjørdi hann meira vaksnan.
20.55 **Biofar - Lívið við føroysku strendurnar** - 3:3



Í hesum seinasta parti av sendirøðini um Biofar verður hugt nærri at teimum ymisku plantu- og djórasløgunum út á 20–25 metra dýpi.
21.15 **Andakt** v/ Juliu Johannesen
21.25 **Tað lýsir fyri degi**
Enskur filmur frá 1988.
Anthony Hopkins er tann loyndarfulli fremmandamaðurin í hesum eyðkenda enska filminum um eina unga gentu, sum skal finna sítt pláss í lívinum – og helst eisini ein drong. Hon hevur gott eyga á einum – men hann sær hana ikki.
23.00 **Hvør hóskar til mín?**
Umleið ein millión kvinnur og menn í Norra eru støk, og nógv teirra vilja fegin finna ein maka. Hví er tað so ringt? Nógvir nýggir møguleikar fyri sambandi eru, men tora tey støku at brúka teir?
Framleiðsla: Nordvision frá NRK.
23.40 **Liðugt**

Útvarp Føroya

Fastar sendingar gerandisdagar:
07.15 **Tíðindi**
07.17 **Morgunlestur**
07.30 **Tíðindi**
07.35 **Góðan morgun Føroyar**
08.00 **Tíðindi***
08.05 **Góðan morgun Føroyar**
09.00 **Tíðindi**
09.05 **Morgunlestur**
09.15 **Dagsins tónar**
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan**
10.10 **Lurtararnir og vit/ Máltráðurin**
11.00 **Tíðindi**
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Tíðindi**
12.01 **Middagstónleikur**
12.15 **Veðurtíðindi, skrá og valuti**
12.20 **Tíðindi og kunngerðir**
12.40 **Døgurðatónleikur**
13.00 **Veðurtíðindi**
13.01 **Nýtt og gott gamalt**
– – –
17.00 **Tíðindi**
18.25 **Veðurtíðindi og skrá**
18.30 **Tíðindi**
21.00 **Tíðindi**

Leygardagur 4. mars
8.05 **Millum átta og níggju**
9.30 **Barnaútvarpið** (e)
11.02 **Norðurlond í dag** (e)
13.01 **Vikan ið fer**
14.00 **Barnaútvarpið** (e)
15.00 **Menuettin**
16.00 **»Soleiðis var tá** (e)
17.00 **Morgunbitar**
19.00 **Ársins V4-dráttur**
19.05 **Leygarkvøld í Fuglafirði**
Eftir V4-dráttin leygarkvøldið kemur tann fyrra sendingin úr Fuglafirði, har sang- og tónleikakreftir haðani fara at meðvirka og prátað verður við fuglfirðingar.
Í sendingini verður heilsað uppá triggjar fuglfirðingar eins og ein spildurnýggjur fuglafjarðarsangur verður á skránni.
Bergur Jacobsen leggur til rættis, og Regin Bjarnastein stendur fyri upptøkuni.
20.00 **Suggan**
21.00 **Gomlu dansirnir**
Flóvin Jacobsen stilar fyri
21.50 **Hetta heilaga evangeliið skrivar** - Inga Poulsen Dam, prestur, leggur til rættis
22.00 **Tíðindi**
22.10 **Náttarravnar**
Í Náttarravnasendingini fara teir báðir Heðin Arge Jensen og Birgir Kruse at spæla nýggjan tónleik. Heðin ummælir nýggju fløguna við amerikanska rockbólkinum Van Halen »Balance«. Evni í spurnarkappingini, sum verður kl. 23.00, eru almenn vitan, tónleikur og ítrótt. Frá kl. 22.00 kunnu lurtarar tekna seg á tlf. 11382 og 11383. Vinnarar verða við í kappingini um høvuðsvinningin, sum er ein ferð fyri tvey við Flogfelagnum og Faroe Travel til Nashville. Á midnátt hugleiðir Høgni Djurhuus um vikuna, ið fer og í náttklubbanum spæla Náttarravnar dansitónleik til kl. 1.
Birgir Kruse og Heðin Arge Jensen leggja til rættis.
1.00 **Veðurtíðindi**

Sunnudagur 5. mars
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Barnaútvarpið**
10.30 **Sunnumorgun**
11.00 **Úr konserthøllini** (e)
12.00 **Gudstænasta í Hósvíkar kirkju** - Martin Restorff Jacobsen, prestur, prædikar
13.10 **Á summarferð við Immanuel**
Vit eru komin til seinasta part av ferðafrásøgnini hjá Axeli Skoubo á Sandi. Hesin teinur røkkur úr Orknoyggjum um Fair Isle og Hetland til Sands.
Í Kirkwall hittu sandingarnir ein annan føroyskan siglara, Carsten Petersen úr Fuglafirði, og teir avráddu at fylgjast heim.
Á leiðini vóru menn á áhugaverdari vitjan á Fair Isle, sum er eitt eldorado fyri fuglafrøðingar, og lagt varð eisini inn í Lerwick at hitta kunningar.
Jógvan Arge og Finnur Olsen leggja til rættis.
13.40 **»Siður, søgn og sangur«**
Føroyskir sangir
Janus Mohr leggur til rættis
14.00 **Tíðindi**
14.15 **»Soleiðis var tá«**
Í triðju og seinastu sendingini fer Elvira Poulsen í Sumba at siga frá gerandisdegnum har suðuri.
Hon endar hesa røðina við frágreiðing um eina havnarferð, sum varði um eitt samdøgur. Hetta var 19. november 1949.
Bergur Jacobsen leggur til rættis.
15.00 **Kvøðuljómar**
16.30 **Barnaútvarpið** (e)
17.00 **Klassiskur tónleikur**
Bjarni Berg ger sendingina
18.00 **»Hart stóð stríð, men Jesus vann** (e)
Jesu sjey orð á krossinum. Inngangur til sendingar, sum verða hvørt mánakvøld í føstuni. Jákup Reinert Hansen og Janus Mohr leggja til rættis
18.30 **Tíðindi**
18.40 **Ítróttatíðindi**
19.00 **Veðurtíðindi**

Mánadagur 6. mars
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Sosiali spurnarkassin**
11.02 **Leygarkvøld í Fuglafirði** (e)
17.05 **Undir Norðstjørnuni**
Nýtt undir Norðstjørnuni finna vit hesuferð í Finnlandi. Úr Åbo hoyra vit Nillu Hansson syngja sangir hjá gyklaranum, tónaskaldinum og yrkjaranum Olle Söderholm. Úr Jyväskylä hoyra vit Elvis Presley á latíni.
Birgir Kruse leggur til rættis.
18.00 **Sosiali spurnarkassin** (e)
19.00 **Jaltaráðstevnan 1945**
Í februar 1945 hittust teir triggir stóru, Roosevelt, Churchill og Stalin at leggja seinastu hond á krígsførsluna móti Týsklandi og Japan.
Hóast amerikanski forsetin var illa sjúkur, noyddist hann at fara til Krim við Svarta Havið, tí Stalin kundi ikki fara úr Sovjetsamveldinum.
Á hesum fundi samdust teir triggir sameindu leiðararnir um høvuðslinjurnar fyri seinastu átøkunum móti Týsklandi og Japan, og helst varð eisini framtíðarbýtið av Europa váttað.
Jógvan Arge leggur til rættis.
19.30 **Rimmarjazzur**
Edvard Nyholm Debes ger sendingina
20.00 **Skák og mát**
Suni Merkistein skipar fyri
20.30 **»Hart stóð stríð, men Jesus vann«** - Jesu sjey orð á krossinum - 2. sending
Jákup Reinert Hansen og Janus Mohr leggja til rættis
21.00 **Tíðindi**

Týsdagur 7. mars
9.30 **Alkohol Kongur**
Amerikanski rithøvundurin Jack London doyði bara 40 ára gamal í 1916. Hóast henda unga aldur hevði hann lagt stórt skaldaverk úr hondum. Hann hevði skrivað ein hóp av skaldsøgum og stuttsøgum, sum fólki dámdi at lesa, og sum fólk framvegis lesa.
Jack London drakk illa, og tað mundi vera drykkjuskapurin, sum førdi til, at hann tók lívið av sær. Tá hevði hann tjent eina millión krónur, men eisini brúkt hvørt oyra.
Trý ár, áðrenn hann doyði, skrivaði Jack London bókina Alkohol Kongur um seg sjálvan og brennivínið.
Útvarpið fer at nú at lesa hana sum framhaldssøgu. Finnbogi Ísakson hevur týtt. Flemming Samuelsen lesur.
11.02 **Á summarferð við Immanuel**
(e) Triði og seinasti partur